VIÐMERKINGAR

## Til Danmarkar at arbeiða

**Roknað verður við, at einir 15.000 eysturevropear koma til Danmarkar at arbeiða í ár**

DANMARK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann 1. mai verða tey eysturevropeisku londini limir í ES, og tað sæst á skrivstovuborðunum hjá teimum donsku arbeiðsávísingunum, skrivar Jyllandsposturin. Ávísingarnar hava fingið so nógvar umsóknir úr Eysturevropa sum ongantíð fyrr, og umleið helmingurin av umsóknunum eru úr Pólandi og Litava.

Umsóknirnar snúgva seg ikki um varandi uppihalds- og arbeiðsloyvi, men um eitt stutt tíðarskeið, tí á tann hátt sleppa umsøkjararnir uttan um tær ásettu tilagingarreglurnar. Hesar reglurnar krevja millum annað, at umsøkjararnir skulu fáa somu løn sum danir, men er talan um eitt stutt tíðarskeið, eru ongar reglur um, hvørja løn tey skulu hava.

Í donsku fakfeløgunum stúra tey fyri, at eysturevropearnir fara at taka arbeiði frá dønum, og tey stúra eisini fyri, at í komandi árum fara nógv fólk í teimum nýggju ES-londunum at leita sær til Danmarkar at arbeiða. Eitt nú væntar fakfelagið SID, at umleið 85.000 pólendingar fara at søkja um arbeiði í Danmark tey næstu tíggju árini. Arbeiðsloysið í Pólandi er um 20 prosent.

## Børn verða tvingað í kríggj

**Harrans Mótstøðuherur í Uganda hevur burturflutt umleið 10.000 børn, ið verða nýtt sum drápsmaskinur**

BØRN OG KRÍGGJ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Seinasta hálvtannað árið hevur uppreistrarfelagsskapurin Harrans Mótstøðuherur ligið í hørðum kríggi við ugandiska stjórnarherin. Meiri enn hálvonnur millión fólk eru flýdd frá húsi og heimi undan bardøgunum, og sambært ST er ugandiska borgarakríggið vorðið ein sonn menniskjalig vanlukka, sum altjóða samfelagið ikki tykist hava stórvegis áhuga í.

Tað hevur leingi verið kent, at Harrans Mótstøðuherur nýtir børn í krígnum, og norðmaðurin Jan Egeland, sum er varaaðalskrivari hjá ST, sigur við Reuters, at seinastu átjan mánaðarnar hevur herurin burturflutt umleið 10.000 børn, sum verða nýtt í krígnum.

– Tey burturfluttu børnini verða gjørd til drápsmaskinur, og tey verða tvingað til at leypa á sínar egnu heimbygdir og at beina fyri sínum egnu skyldfólkum, sigur Jan Egeland. Tá skyldfólkini eru deyð, hava børnini ongan at fara aftur til, og so hava tey ikki annað í at velja enn at halda fram sum hermenn hjá Harrans Mótstøðuheri, sigur ST-varaaðalskrivarin.

Tær burturfluttu genturnar verða eisini nýttar sum hermenn, men flestu teirra verða eisini nýttar sum skøkjur hjá hermonnunum, sigur Jan Egeland.

*Borgarakríggið í Uganda er ógvuliga harðligt. Hesin maðurin var heppin at sleppa livandi frá einum álopi hjá Harrans Mótstøðuheri*



## Snarfundur sum Miðeystur

**Broytingin í amerikanska miðeysturpolitikkinum hevur fingið felagsskapin hjá teimum islamsku londunum at kalla saman til snarfundar at viðgera støðuna**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Malaysia hevur í løtuni formansskapin í felagsskapinum hjá teimum islamsku londunum, og malaysiska stjórnin kunngjørdi í gjár, at hon hevur boðsent londunum til fundar sum skjótast.

Upprunaliga skuldu londini hittast tann 4. mai, men malaysiski uttanríkisráðharrin, Syed Hamid Albar, sigur, at fundurin er framskundaður, tí at USA hevur broytt sín politikk í Miðeystri.

Sambært ráðharranum er friðarætlanin fyri Miðeystur farin av kós, nú George W. Bush, forseti, hevur sagt, at Ísrael kann varðveita nakrar av niðursetubygdunum á Vestara Áarbakka. Palestinski forsætisráðharrin, Ahmed Qurie, sigur, at amerikanska avgerðin kann als ikki góðtakast. Qurie sigur, at við avgerð síni hevur Bush oyðilagt ta friðarætlanina, sum USA var við til at leggja fram saman við ST, ES og Russlandi.

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, hevur roynt at sissa palestinsku leiðsluna. Powell hevur tosað við Qurie í telefon og sagt honum, at amerikanska stjórnin leggur størsta dentin á, at Ísrael nú er til reiðar at taka seg úr Gaza-geiranum. Tað er ikki greitt, hvat Quri svaraði, men palestinski uttanríkisráðharrin, Nabil Shaath, segði í gjár, palestinar eru sera vónsviknir av teirri nýggju amerikonsku støðuni.

Heldur ikki ES tekur undir við avgerðini hjá Bush. Írland hevur í løtuni formansskapin í ES, og írski uttanríkisráðharrin, Brian Cowen, sigur, at ES góðtekur einki annað landamark uttan tað, sum var galdandi undan seksdagakrígnum í 1967, uttan so at ísraelsmenn og palestinar semjast um eitt annað mark.

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, hevur eisini funnist at nýggju støðuni hjá amerikanska forsetanum.



*Avgerðin hjá George W. Bush at góðtaka ísraelsku niðursetubygdirnar á Vestara Áarbakka hevur koyrt friðartilgongdina av kós, sigur malaysiski uttanríkisráðharrin*



# Borðoyarnes KG 183

Palli hjá Marionnu, sáli, var tiltikin fiskiskipari, og man hann við at baksast og stríðast hava drigið mangan fiskastertin á dekkið.

Palli man eins og onkur annar fiskigarpur hava verið bæði álit og stuðul hjá J. F. Kjølbro.

Jú, tá var tíðin øðrvísi. Um ikki altíð góðar tíðir, so vóru tær spennandi og mennandi fyri Klaksvíkina. Palli hjá Marionnu hevur m.a. ført Borðoyarnes, sum J. F. Kjølbro lat byggja á Skála Skipasmiðju. Hetta var hildið at vera eitt stórt framstig og eitt megnartak í sínari tíð.

Skipið hevur síðani verið á fleiri reiðarahondum. Tað seinasta, eg havi frætt, er, at Borðoyarnes er til enn og skal vera í Godthåb í Grønlandi. Borðoyarnes er bygdur í 1967.

Um onkur lesari ynskir at ogna sær tekning, kann hann venda sær til Jógvan Háfjall, tlf. 310345.










